# Oddagrein

**Eyðun Klakstein**
*eydun@sosialurin.fo*



# UNGFÓLK GERA VART VIÐ SEG




Fríggjadagin upplivdu vit nakað, sum vit ikki ofta uppliva nú á døgum. Tey ungu gjørdu vart við seg, tí tey hildu seg verða fyri órøttum. Ætlanin hjá politiska myndugleikanum, sum er farin undir at viðgera fíggjarlógina komandi ár, er at skerja lestrarstuðulin hjá teimum ungu. Tað vilja tey lesandi ikki finna seg í, og tí varð kallað saman til mótmælisgongu í høvuðsstaðnum fríggjadagin. Og nógv lesandi úr øllum landinum møttu til tiltakið.

Nú á døgum er tað helst meira gerandiskostur, at tey ungu savnast til Paradise-veitslur, konsertir, LAN-party og annað – tað snýr seg um undirhald og upplivingar. Tí var tað hugaligt at síggja, at ungfólk framvegis kunnu finna saman at gera vart við seg á gøtunum, at mála skelti, kalla tiltakið eina mótmælisgongu og siga politikararunum, at tey finna seg ikki í viðferðini, tey fáa.

»Ongan studning – onga framtíð« stóð skrivað á einum av skeltum, og hvat var tað ikki herligt at síggja hondskrivað mótmælisskelti verða veipa ímóti polikarunum ein fríggjadag í oktober.

Skerjingin av lestrarstuðlinum kann síggjast í bæði einum og øðrum ljósi. Politiski myndugleikin roynir at vísa á, at neyðugt er skerja nógvastaðni, og at føroyski lestrarstuðul er hægri, enn hann er í grannalondunum. Tí er tað rímiligt at skava nakrar hundrað krónur av føroyska stuðlinum. Hetta verður gjørt samstundis, sum tað verður mett sum týdningarmikið, at tey ungu fara at lesa víðari, taka eina útbúgving og seinni kunnu geva samfelagnum nakað munagott. Tey skulu bara ikki hava so nógvar pengar fyri at útbúgva seg, sum tey hava fingið.

Ferðastuðulin til tey lesandi uttanlands skal eisini skerjast. Føroyingar, sum útbúgva seg í øðrum londum, skulu hava minni av pengi til at ferðast heim við. Ein skerjing á 1000 krónur fyri hvønn persón um árið er næstan láturlig, tá ið vit í Sosialinum fríggjadagin kunnu lesa um, hvussu nógvan ferðastuðul løgtingsfólk uttan fyri Havnina fáa fyri at ferðast millum heimið og arbeiðið.

**» Hugaligt at síggja, at ungfólk framvegis kunnu gera vart við seg á gøtunum**

---

## Teitur í føroyskum einglaljóði

Teitur Lassen hevði í gjárkvøldið konsert í stóra Konsertsalinum hjá Danmarks Radio, og tíðarritið Gaffa gevur Teiti gott ummæli fyri framførsluna.

Ummælarin heldur, at Teitur við sínum eyðmjúka og inniliga stíli megnaði væl at fylla salin, og tað var líkavið, at honum ikki nýttist ein bólk afturat sær. Gaffa heldur, at tað hoyrdist á bólkinum, at talan fyri stóran part var um nýggjar sangir, og bólkurin tí ikki hevði spælt tilfarið áður á konsertum.

– Við sannførandi rødd og góðum gittarspæli kundi Teitur havt klárað seg uttan fylgispæl frá bólkinum, og tað hevði kanska eisini veirð betri, sigur ummælarin hjá Gaffa.

Blaðið heldur, at løtan, tá ið eitt føroyskt gentukór kom á pallin at syngja saman við Teiti, var stór.

– Tá blivu armsveiggini hjá Teitur stór, og røddin hjá honum var umgyrd av einglaljóði, skrivar Gaffa.

Blaðið gevur Teiti fýra av seks stjørnum fyri framførsluna í gjárkvøldið.





**» Ørskapurin fekk frítt spæl**

REIDAR NÓNFJALL
SÍÐA 12-14



**» Vit arbeiddu seriøst**

BJARNI OLSEN
SÍÐA 35



## Leivdirnar kunnu smitta

Vil, vembur, kleyvar og aðrar leivdir frá fletting, sum ikki verða gagnnýtt, skulu burturbeinast á skynsaman hátt.

Tað sigur Umhvørvisstovan í eini fráboðan, nú slaktið er fyri kring landið.

– Leivdir frá fletting skulu ikki at verða beindar í á, fjøru ella haga. Henda dálking av umhvørvinum kann ofta síggja ótespilig út, geva ringan lukt og verða atvold til smittu, sigur Umhvørvisstovan.

Heitt verður á fólk um at beina tær leivdir frá fletting og slakti, ið ikki verða gagnnýttar, í bingjur, sum kommunurnar hava standandi til hetta endamálið. Í hesar bingjur kann eisini annað lívrunnið tilfar latast í, tað veri seg slógv, fjaðrar, og annað.

Síðan ásetingarnar í kunngerð um heilsuásetingar fyri hjáframleiðslu úr djórum, sum ikki er ætlað til matna komu í gildi 1. januar 2008, hevur tað verið bannað at grava niður leivdir frá flettingini. Sambært kunngerðini skal alt djóraburturkast frá slátri samlast saman í serligar bingjur til endamálið á góðkendum stað og burturbeinast á góðkendum brennistøðum.

**Sosialurin**
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*